# Kvenntoskur gerst longri og eld

**Fiskirannsóknarstovan eigur ein hóp av taltilfari, sum er savnað inn gjøgnum tíðina. Seinastu árini er eitt miðvíst arbeiði gjørt fyri at umskipa innsavnaðu hagtølini í nýggjar dátugrunnar. Hesir grunnar geva hópin av møguleikum til kanningar av ymiskum viðurskiftum, sum annars kundu verið torfør at kanna, um tølini ikki vórðu skipað**

HAGTØL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið talan er um menniskju, verður mangan havt á lofti, at munur ikki má gerast á kynunum. Hinvegin eru munirnir á kynunum fleiri, eitt nú á miðalhædd og miðalaldri. Hjá fiski ber ikki til at skera yvir ein kamb. Kvenntoskur er størri enn kalltoskur, men eingin munur er á kvenn-og kallupsa.

### Nógv taltilfar

Regin Reinert, hagfrøðingur, veit at siga, at hópur av taltilfari er savnað inn á Fiskirannsóknarstovuni gjøgnum tíðina, og seinastu árini er eitt miðvíst arbeiði farið fram til tess at umskipa innsavnaðu hagtølini í nýggjar dátugrunnar.

- Hesir dátugrunnar geva – umframt at vera grundarlagið undir stovnsmetingunum – hópin av møguleikum til at kanna ymisk viðurskifti, sum annars ofta eru torfør at kanna, um tølini ikki eru væl skipað.

Hann vísir á, at ein av dátugrunnunum er tann, sum nevnist "Magnus-dátugrunnurin". Í hesum grunni liggja nágreiniliga uppgjørd veiðitøl hjá Magnusi Heinasyni.

- Øll veiðan er skrásett – nær, hvar og hvussu nógv av hvørjum fiskaslagi. Royndir eru tiknar av veiðini, har longd, vekt, aldur, kyn og annað eru skrásett fyri hvønn fiskin sær. Á summum túrum er eisini magainnihaldið hjá fiski skrásett niður í minstu smálutir.

### Fiskasløgini

Regin Reinert veit at siga, at tilsamans eru 107 ymisk fiskasløg við í grunninum, harav nógv ymisk fiskasløg, sum flestu fólk ongantíð hava hoyrt um.

- Hvør kennir eitt nú kikarafisk, gestfiskin ella snípuállin? spyr hann og vísir á, at hetta eru alt fiskasløg, sum Magnus Heinason hevur fingið á rannsóknartúrum í føroyskum sjógvi.

Hann vísir á, at um fólk eru áhugaði, kunnu tey vitja heimasíðuna hjá Fiskirannsóknarstovuni og leita eftir nevndu fiskasløgum á síðuni við fiskanøvnum.

- Tá ið skrásetingarnar liggja væl skipaðar, sum tær gera í Magnus-dátugrunninum, er laga manni at gera eksplorativar dataanalysur, nevniliga at leita eftir fyribrigdum, sum kunnu staðfestast hagfrøðiliga út frá ávísum talgrundarlagi.

### Ikki eins

Regin Reinert vísir á, at millum menniskju er eitt nú stórur munur á miðalhæddini hjá kvinnum og monnum, og somuleiðis gerast konufólk eldri enn mannfólk.

- Men hvussu er so við fiskinum, spyr hann, eitt nú toski, hýsu og upsa?

Hann sigur, at hesir spurningar eru lættir at svara, tá ið ein góður dátugrunnur, sum Magnus-dátugrunnurin, er til taks.

- Týðiligur longdarmunur er millum kall-og kvenntoskin, men eingin munur er á kall-og kvennupsa.

Regin vísir á, at kvenntoskur gerst bæði longri og eldri enn kalltoskur, og jú eldri toskurin verður, tess størri er longdarmunurin millum kvenn-og kallfiskin.

- Hinvegin er eingin munur á longdini á kall-og kvennupsa – líka mikið, hvussu gamal fiskurin verður. Kvennhýsan gerst longri enn kallhýsan, og longdarmunurin gerst størri við aldrinum, men kallfiskurin livir longri.

### Magainnihaldið

Sum nevnt, so hevur Fiskirannsóknarstovan eisini skrásett magainnihaldið.

- Samanlagt eru umleið 16.000 magar kannaðir umborð á Magnusi Heinasyni, 6.000 toskamagar, 5.500 hýsumagar, 4.000 upsamagar og 500 aðrir magar.

Regin Reinert vísir á, at kvenntoskurin etur munandi meira enn kalltoskurin.

-Tað sæst, at kvenntoskurin etur munandi meira enn kalltoskurin, og soleiðis er gott samsvar millum úrslitini frá magakanningunum og vektkanningunum, sigur hagfrøðingurin, Regin Reinert á Fiskirannsóknarstovuni.



*Kvenntoskur gerst bæ›i longri og eldri enn kalltoskur - og kvenntoskurin etur eisini nógv meira, vísa hagtøl, sum Fiskirannsóknarstovan eigur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Granskingarkjarnin innan veiðitøkni:

# Verður nú partur av stórari ES-verkætlan





*Tað var á hesum f... tá var samskipari, ... Fiskimálaráðið he...*

**Bjarti Thomsen, fiskifrøðingur, ið starvast sum granskari innan veiðitøkni, heldur, at eitt av endamálunum við føroyskari gransking má vera at sleppa upp í part í altjóða høpi og á henda hátt fáa atgongd til vitan, útgerð og fígging, sum annars ikki er atkomilig**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*